## Vænta stjórnarbroyting

Í Danmark eru teir politisku eygleiðararnir á einum máli um, nat Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, fer at umskipa stjórnina. Spurningurin er bara, nær tað verður. Summir eygleiðarar vænta, at tað verður beinanvegin, men aðrir vænta, at tað verður um ein mánað ella tveir. Samstundis verður gitt, hvørjar btoytingarnar verða. Tey flestu vænta, at ráðharrin í vísindi, Helge Sander, fer úr stjórnini, og einstakir eygleiðarar gita, at Per Stig Møller fer frá sum uttanríkisráðharri, og at floksfelagin Lene Espersen tekur við eftir hann.



# Jón Brian í fakfelagsligari serstøðu

**Jón Brian Hvidtfeldt, sum hevur fingið ætlanarskriv um uppsøgn úr Kringvarpinum, er limur í felagnum Føroysk Miðlafólk, men hann er settur eftir sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum**

UPPSØGN

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Jón Brian Hvidtfeldt hevur freist til í dag at svara upp á ætlanarskrivið*

Í dag er hoyringsfreistin hjá Jón Brian Hvidtfeldt úti. Hann skal koma við viðmerkingunum til ætlanarskrivið, sum hann fekk frá stjóra sínum í Kringvarpinum, um at hann skal sigast upp sum tíðindaleiðari í útvarpinum.

Jón Brian Hvidtfeldt er tó framvegis til arbeiðis í kringvarpinum, men leiðarauppgávan er tikin frá honum, og ein starvsfelagi hansara hevur fingið tænastuboð um at virka sum tíðindaleiðari í staðin.

Tað er eitt sindur ógreitt, hvat nú fer at henda.

Fakfelagið hjá Jón Brian Hvidtfeldt, Føroysk Miðlafólk hevur mótmælt, og felagið stuðlar annars limi sínum við løgfrøðiligari hjálp.

- Hetta er ein fakfelagslig og serstøða, tí Starvsmannafelagið umsitir sáttmálan, ið ein limur hjá føroyskum miðlafólkum er løntur eftir. Er talan um sáttmálabrot, er tað sáttmálin hjá Starvsmannafelagnum, ið er brotin, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Føroyskum Miðlafólkum.

Hon sigur, at felagið altíð stuðlar limum sínum við løgfrøðiligari hjálp í sambandi við uppsøgn, í kringvarpinum líka so væl sum á bløðunum.

Beint nú liggur málið hjá Jón Brian Hvidtfeldt hjá sakførara.

### Fløkja

Fyri Starvsmannafelagið er málið eisini løgið á tann hátt, at fleiri starvsfelagar hjá Jón Brian Hvidtfeldt eru limir í Starvsmannafelagnum, og sum limir í Starvsmannafelagnum eru teir farnir upp á barrikadurnar vegna ein lim í Føroyskum Miðlafólkum, vísir Anna V. Ellingsgaard á.

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum heldur ikki, at Starvsmannafelagið er partur í málinum, hóast talan er um teirra sáttmálaøki.

- Fyri meg sum fakfelagsforkvinnu sannførir hetta meg enn einaferð um, at øll miðlafólk eiga at vera í sama fakfelag, so vit standa sterkari, og hesum arbeiða vit eisini støðugt fram ímóti, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Føroyskum Miðlafólkum.

# Nógv rúsevni koma til Íslands

**Níggju fólk eru seinastu vikurnar varðhaldsfongslað í Íslandi fyri rúsevnissmugling**

RÚSEVNI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Hørðu rúsevnini streyma inn í Ísland, og smuglingarleiðirnar eru fleiri.

Ein nógv brúkt leið er úr Danmark við Norrönu um Føroyar til Seyðisfjarðar, ein við flogfari úr Keypmannahavn og ein við flogfari úr USA. Aftrat tí koma onnur skipini.

Tollvaldið í Íslandi hevur seinastu vikurnar lagt hald á fýra kilo av amfetamini og 1,3 kilo av kokaini. Haraftrat koma trý kilo av metaamfetamnini og 4.200 ecstasy-tablettir, sum tollararnir í Føroyum funnu. Henda sending var ætlað til íslendska marknaðin.

Ein rumeni og ein maður, sum er undir illgruna fyri at hava samstarvað við honum, vórðu tiknir á flogvøllinum í Keflavík við hálvum kilo av kokaini. Rumenin kom við flogfari úr Keypmannahavn.

Tríggir litavar vórðu varðhaldsfongslaðir í Íslandi, eftir at tollvaldið og politiið funnu 1,3 kilo av metaamfetamini og 4.200 krónur í bilinum hjá tvemum øðrum litavum, sum komu í land í Føroyum av Norrönu men skuldu víðari til Íslands. Í sama máli hava tveir litavar sitið varðhaldsfongslaðir í Føroyum í tveir mánaðir.

Ein íslendingur varð handtikin, tá ið hann kom við flogfari úr Berlin til Íslands við fýra kilo av amfetamnini. Hesin maðurin peikaði beinanvegin út ein hjálpara, og teir báðir vórðu varðhaldsfongslaðir, skrivar íslendska blaðið Visir.

Ein útlendskur maður og ein íslendsk kvinna vórðu varðhaldsfongslað í Reykjavík, eftir at tey vórðu komin úr USA við 800 grammum av kokaini í viðførinum.



*Sterk rúsevni floyma inn í Ísland*